# Nú bjarga vit mannalívum

*Guvernørurin í Uverkhangai sigur, at stjórnin hevur gjørt tað, hon hevur kunnað til tess at bjarga dýrunum. Nú gerst ikki meira – tí nú skal fólkið bjargast, sigur hann*



*Guvernørurin í Uverkhangai, landslutinum, ið er ringast fyri í náttúruvanlukkuni í Mongolia, greiðir norðurlendsku tíðindafólkunum frá*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

EIRIKUR LINDENSKOV
ARVAUHEER
MONGOLIA

– Hetta hevur verið ein sera trupul tíð hjá okkum. Vit hava fyrstu tíðina roynt at gjørt tað, vit hava kunna fyri at bjarga dýrunum, sum eru lívsgrundarlagið hjá okkum. Men nú síggja vit veruleikan í eyguni, at fellið verður út við ein triðing av øllum dýrum. Nú mugu vit hugsa um fólkini – og tryggja teimum føði, sigur O. Batgmunkh, sum er guvernørur í landslutinum Uverkhangai, umboðandi Tjóðskaparflokkin, sum eisini situr í landssins stjórn saman við Javnaðarflokkinum.

Guvernørurin greiðir norðurlendsk tíðindafólkunum frá støðuni. Hann sigur, at um 9.000 familjur hava færri 100 djór, og at tey eru størsti vandabólkurin, tí tey tola ikki at missa.

– Tit mugu minnast til, at hetta er høvuðsvinnuvegurin í landsluti okkara. Ringast raktu familjurnar hava mist tað, tey hava stríðst fyri seinastu fimm árini, og tað fer at taka teimum minst fimm ár at koma uppaftur á sama støði.

Fyri at bjarga sær eitt sindur av inntøkuni taka bóndurin skinnini av djórunum at selja. Av somu orsøk er sjónin tað ótespiligari at síggja túsundtals naknu djórini liggja á markini.

Guvernørurin greiðir frá, at stjórnin fyrst og fremst hevur gjørt hvat hon kann at tryggja dýrini.

– Vit hava roynt at útvega fóður og heilivág, men ráðini eru tíverri ikki tey nógvu, sigur hann, og skundar sær at leggja afturat, at nú verður bara hugsað um fólkini.

– Tað kann gera tað sama at fara at stríðast við at útvega fóður til øll djórini – tí kemur hjálpin ikki innan 10 dagar, er hon nyttuleys.

Her í býnum ganga annars søgur um, at í grannalandslutinum eru 800 tons av fóðuri til sølu.

– Jú, tað er rætt. Tað er ein privatur felagsskapur sum eigur fóðrið - og vit hava ikki ráð at keypa tað.

Hetta ljóðar løgi í okkara oyrum, men havandi longu avstandirnar í huga og sera vánaliga samferðslunetið, so skal nógv til at flyta fóðrið higar.

Guvernørurin leggur dent á, at nú verður alt gjørt til tess at tryggja mannalív.

## Kunna um náttúruvanlukkuna í Mongolia

Leygardagin komu sjey tíðindafólk úr Íslandi, Føroyum, Danmark, Noreg, Svøríki og Finnlandi til Ulaam Baatar, høvuðsstaðin í Mongolia. Tað er UNDP, menningardeild undir Seimeindu Tjóðum, sum hevur boðið á ferðina.

Endamálið er at kunna um tað hjálpararbeiðið, sum ST hevur í Mongolia. Men síðani tíðindafólkini vórðu boðin á ferðina, hevur rættulig náttúruvanlukka herjað landið við nógvum kulda. Av tí sera ringa summarinum í fjør – og so vanlukkuliga kalda vetrinum í ár – er støðan vorðin katastrofal.

Grundarlagið hjá stórum parti av fólkinum er hótt – eins og grundarlagið hjá nomadunum – flytifólkinum.

Sosialurin fer at fylgja við komandi dagarnar – og tá tað slepst á internetið, so lata vit frætta heim.

**Eirikur Lindenskov, Uverkhangai, Mongolia**



*Allastaðni síggjast deyð kríatúr liggja og sløðast. Sjónin verður ikki tespiligari av, at nomadarnar hava tikið skinnini – fyri kortini at tjena nøkur oyru...*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*





*Ein nomadufamilja, sum júst hevur víst norðurlendsku tíðindafólkunum blíðskap, sigur farvæl. Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Lívsgrundarlagið er álvarsliga hótt

*Sera stóra fellið hjá bóndunum í Mongolia er ein álvarslig hóttan móti nomadutilveruni, og serliga hart hevur hetta rakt landspartin Uverkhangai, har roknað verður við at missa triðingin av øllum djórunum*

EIRIKUR LINDENSKOV
ARVAUHEER
MONGOLIA

Vánaligi gróðurin síðsta summar og sera harði veturin í Mongolia – serliga ársins fystur mánaðirnir hava elvt til stórt felli hjá mongolsku bóndunum.

Nógvi hitin og vantandi vætan síðsta summar gjørdu, at lítil gróður var. Uppaftur verri gjørdist støðan, tá bøurin varð herjaður av *robbins*, sum er eitt serligt músaslag, ið etur grasrøturnar. Hesar mýs herja um 12. hvørt ár, men skaðin, tær elva, er ikki so stórur, tá gróðurin er vanligur.

Tí stúrdu bóndurnir fyri vetrinum. Summir slaktaðu í heldur meira lagi, meðan aðrir royndu sum frægast at leggja fóður innundir seg. Men veturin gjørdist harður – so harður, at nærum triðingurin av kríatúrunum er deyður í hungri.

Vanliga er veturin kaldur, men ongantíð so kalt, sum í januar, februar og mars í ár. Tað er ikki ókent, at kuldin kemur niður móti teimum tredivu kuldastigunum, men í ár hava teir mált kulda niður í –40 stig í tíggju samanhangandi dagar.

Tykkara útsendi er saman við seks øðrum norðurlendskum tíðindamonnum á ferð í Mongolia við menningardeildini hjá ST (UNDP – United Nations Development Program). Í dag (mánadagin 3. apríl) vitja vit í býnum Arvauheer í landslutinum Uverkhangai. Í hesum býnum búgva um 25.000 fólk, harav fleiri eru seminomadar – tað vil siga, at tey liva sum nomadar, men hava kortin fast tilknýti til býin.

Í landslutinum, sum til víddar er 63.500 ferkilometrar, búgva 114.000 fólk. Høvuðsvinnugreinin er djórahald – og livir stórur partur av fólkinum sum nomadar – flytifólk. Tey hava vanliga fýra fastar bústaðir, ein um summarið, ein um veturin, ein um heystið og ein um várið.

Tey búgva í telti – ofta fleiri familjur saman í grannalag, og so flyta tey teltini millum bústaðirnar. Tað kann vera upp til 100 kilometrar millum bústaðirnar.

Av bruttotjóðarúrtøkuni í Uverkhangai stava 74,6% frá djórahaldi – og tá er als ikki talan um stórar garðar. Vanligi bóndin hevur um 100 djór, skal hann klára seg so hampuliga. Tilsamans eru um 20.000 flytubóndur, og tann størsti parturin av teimum hevur millum 50 og 200 djór, sum fyri tann størsta partin eru neyt, hestar, geitir, seyður og kamelar.

Tað er ein syndarlig sjón at síggja deyðu dýrini liggja og sløðast í landslagnum. Vit kundu telja upp í fleiri túsund deyð djór fram við vegnum, tá vit koyrdu til hendan mest herjaða landslutin, sum liggur um 500 kilometrar útsynning úr høvuðsstaðnum, Ulaam Baatar. Vegirnir eru sera ringir, og ofta verður koyrt eftir turru markunum – sum í sera stóran mun minna um oyðimørk, hóast gróðurin nú skuldi sæðst.

Stóra fellið hjá bóndunum byrjaði í januar, og síðani tá er uppgjørt fram til í dag, at 412.800 djór eru deyð í hesum landslutinum. Hetta er 13.9% av øllum djórunum, men roknað verður við, at hetta talið fer at vaksa til tað dupulta áðrenn gróðurin í mai.

Hetta er eisini ringasta, tá kríatúrini skulu føða. Er ringt at fáa kríatúrunum føði er hvana verri at halda lív í teim smáu, tá heilsustøðan hjá djórunum er so vánalig.



*Tað er ein syndarlig sjón at síggja deyðu dýrini liggja og sløðast í landslagnum. Vit kundu telja upp í fleiri túsund deyð djór fram við vegnum, tá vit koyrdu til hendan mest herjaða landslutin, sum liggur um 500 kilometrar útsynning úr høvuðsstaðnum*

BILSMIÐUR

Vit sóknast eftir einum dugnaligum bilsmiði til persónbilaverkstað okkara at byrja skjótast.

Ætlanin er, at tann, ið settur verður í starvið, skal verða næsti maður verkførarans. Hetta viðførir eftirútbúgving til kunnleikastøði av Volvo og Renault persónbilum.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina skrivliga umsókn við avriti av møguligum prógvum og ummælum.

Um tú hevur fyrispurningar um arbeiðið, kanst tú ringja og spyrja eftir Johannes Rasmussen, verkførara.

Sosialurin - 311820

*pf. Brøður Petersen Bilar*
Hoyvíksvegur 61 • Boks 3130 • FO-110 Tórshavn • Tel. 31 43 60 • Fax 31 56 96

*Brøður Petersen Bilar umboðar Volvo persónbilar, lastbilar og bussar og Renault persónbilar. Umframt persónbilaverkstað hava vit eykalutagoymslu, søludeild og lastbila- og bussverkstað.*